## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi. turt og sólglottar. Hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagiu gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, mikudagin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 10 og 14 stig.

# Andaligt og ítróttarligt hond í hond

*Orð og myndir: Kári Mikkelsen*

Einaferð búðu 170 fólk í Skúvoy, men tá var bara kirkja í bygdini. Avtoftingin av útoyggjunum hevur eisini rakt Skúvoy meint, tí í dag búgva bert 25 fólk í vøkru oynni vestan fyri Sandoynna. Harafturímóti hava íbúgvarnir í dag ein lítlan sparkivøll at stytta sær stundir á, og hann liggur beint víðsíðuna av hugnaligu kirkjuni, sum er bygd í 1937.

Yngsta barnið í bygdini er 13 ár, so tað eru mest avbygdabørn við røtrum í oynni, sum fáa gleði av FIFA-sparikivøllinum, har fyrsta girðingin varð rivin leys í einum útsynningsstorrmi. Síðani er nýggj og sterkari girðing sett upp.





*Meðan mjørkin lá yvir miðstaðarøkið í gjár, var brennandi sól í Skúvoy*

*Tveir níggju ára gamlir avbygdadreingir á sparikivøllinum í Skúvoy. Yngsta fastbúgvandi barnið er 13 ár og einasti skúlanæmingur í oynni*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 33 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 29 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 999 hPa. sunnan fyri Ísland fer vestureftir og grynnist. Ein hitabrúgv yvir Føroyum stendur fyribils í stað, men fer leygardagin vestureftir.



**Í dag:**
Hátrýstið í landnyrðing úr Jan Mayen stendur mestsum í stað og sendir lýggja luft frá Skandinaviu móti Føroyum

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/07 kl. 06[00] – 02/07 06[00]. Hitin í gjár: 10,8°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 01/07 kl. 06[00] – 02/07 06[00].
Avfallið higartil í juli: 0 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

1. juli — Mánin næstur jørðini
3. juli — Tendring
4. juli — Jørðin longst frá sólini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. juli | 8:31 | 21:00 | 7:31 | 20:00 | 7:46 | 20:15 | 10:31 | 23:00 | 11:31 | - | 6:46 | 19:15 |
| 5. juli | 9:26 | 21:52 | 8:26 | 20:52 | 8:41 | 21:07 | 11:26 | 23:52 | 0:00 | 12:26 | 7:41 | 20:07 |
| 6. juli | 10:16 | 22:40 | 9:16 | 21:40 | 9:31 | 21:55 | - | 12:16 | 0:52 | 13:16 | 8:31 | 20:55 |
| 7. juli | 11:02 | 23:24 | 10:02 | 22:24 | 10:17 | 22:39 | 0:40 | 13:02 | 1:40 | 14:02 | 9:17 | 21:39 |
| 8. juli | 11:44 | - | 10:44 | 23:05 | 10:59 | 23:20 | 1:24 | 13:44 | 2:24 | 14:44 | 9:59 | 22:20 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. juli | 5:46 | 18:15 | 8:46 | 21:15 | 9:46 | 22:15 | 8:16 | 20:45 | 9:31 | 22:00 |
| 5. juli | 6:41 | 19:07 | 9:41 | 22:07 | 10:41 | 23:07 | 9:11 | 21:37 | 10:26 | 22:52 |
| 6. juli | 7:31 | 19:55 | 10:31 | 22:55 | 11:31 | 23:55 | 10:01 | 22:25 | 11:16 | 23:40 |
| 7. juli | 8:17 | 20:39 | 11:17 | 23:39 | - | 12:17 | 10:47 | 23:09 | - | 12:02 |
| 8. juli | 8:59 | 21:20 | 11:59 | - | 0:39 | 12:59 | 11:29 | 23:50 | 0:24 | 12:44 |

Lesið
Sosialin